# Premier League er dreymurin




*Christian Restorff Mouritsen skrivaði í vetur undir sáttmála við Manchester City. Longu nú hevur hann roynt seg sum málskjútta móti bæði Liverpool og Manchester United*

**Tveir ungir føroyskir fótbóltsspælarar eru nú í ferð við at skapa sær dreymatilveruna sum yrkisleikari í kanska bestu fótbóltskappingini í heiminum**

**Útisetar**

*Jákup Mørk*

Hóast Ingi Højsted og Arsenal í fjør komu ásamt um, at skaðaplágaði føroyski unglingin skuldi loysast úr sínum sáttmála, er føroyska manningin í Onglandi økt.

Fyrst var tað Johan Troest Davidsen úr NSÍ, sum fekk møguleikan. Millum feløgini, sum høvdu sýnt honum áhuga eftir væl eydnaðu føroysku NM-luttøkuna í Finnlandi, var enska Everton. Talan var av fyrstan tíð um venjingarupphald, men ungi NSÍ-leikarin spældi somikið væl, at ensku venjararnir vildu hava hann aftur.

Alt endaði so við, at Johan í heyst skrivaði undir sáttmála við enska felagið, og so er spurningurin, hvørt hann verður enn eitt av nøvnum úr góða fótbóltsskúlanum hjá Everton, har Wayne Rooney helst er størsta navnið, sum higartil er komið fram.

Og tað gekk ikki long tíð, áðrenn enn ein føroyingur var í Onglandi. Somuleiðis var talan um leikara, sum hevði verið partur av føroysku NM-luttøkuni, og hesaferð var tað match-vinnarin frá minniliga sigrinum á Danmark. Christian Restorff Mouritsen hevði fingið talent-skótarnar hjá Manchester at ressast við, og eftir nakað av tinginum við HB, eydnaðist tað um ársskiftið at fáa nýggja leikaran til felagið.

Og tað er eisini møguleiki fyri, at teir báðir landsliðsfelagarnir fáa møguleika at heilsa upp á hvønn annan. Frástøðan millum Manchester og Liverpool er ikki stórt meira enn hálvan tíma í toki, so heilt einsamallir munnu teir ikki vera.

## Málið er Premier League

Hesi vóru orðini, sum bæði Johan og Christian nýttu, tá teir á tíðindafundum skuldu greiða frá, hvørjar ætlanir teir høvdu, nú teir fluttu til Onglands.

Kanska fer tað at eydnast hjá teimum, og kanska ikki. Men undir øllum umstøðum, so fær tað ikki verið annað enn menningandi, tá leikarar á ungum árum sleppa at taka við teir bestu útlendsku javnaldrarnar. Ikki bara eina ella tvær ferðir um árið, men hvønn dag. Og tá talan so samstundis er um venjarar, sum í allar flestu førum verða roknaðir sum stórir kapasitar á sínum øki, eigur hetta í longdini at hækka um støðið á føroyskum fótbólti.

Og fyrr ella seinni, so eydnast tað væl eisini at fáa ein føroyskan leikara í bestu ensku deildina.



*Johan Troest Davidsen hevur higartil leikt hampuliga nógvar dystir í verjuni hjá Everton-unglingunum*

# Claus skal lyfta Coventry

**Eftir eina strævna tíð á benkinum tykist Claus Bech Jørgensen hava vunnið sær veg fram til teir fyrstu ellivu hjá Coventry. Og her er uppgávan púrasta greitt at vinna á niðurflytingarvandanum**



*Fyrstu dystirnar í vár hevur Claus Bech Jørgensen verið fastur maður hjá Coventry*

**Útiseti**

*Jákup Mørk*

Talan gjørdist um eitt hendingaríkt ár hjá Claus Bech Jørgensen í fjør.

Ikki minst, tí hann í heyst brádliga fekk møguleika fyri altjóða fótbólti. Ikki tí. Við føroyskum ættarbondum á móðursíðuni hevði hesin møguleikin leingi verið til staðar, men av fyrstan tíð hevði hann lítlan hug at royna seg á føroyska landsliðnum. Dreymurin var framvegis at sleppa upp í part á danska fótbóltslandsliðnum, og tað var eisini hesin dreymurin, sum á sinni rak norðurjútlendingin úr tryggu rammunum í lítla Humlum til Ongland, har hann sjálvur royndi at fáa í lag royndarvenjingar.

Tað endaði tá við, at hann fekk sáttmála við Bournemouth, og síðani tá hevur Ongland verið bústaðurin hjá Claus. Eftir nøkur ár í Bournemouth varð hann keyptur til Bradford, sum tá júst var flutt úr bestu ensku røðini, men her slerdi hann ongantíð av álvara til.

Hann skifti fyri hálvum øðrum ári síðani til Coventry, men heldur ikki her tóktist ganga eftir vild. Fyrrverandi stórleikarin, Gary McAllister, tóktist ikki geva hálva føroyinginum stórvegis ans, og ístaðin gjørdist talan um leigusáttmála við Bournemouth.

Treiski jútlendingurin vildi tó ikki gevast á hondum. Til kappingarbyrjan í ár var hann aftur í Coventry, og nú tykist ganga betri. Eisini hóast skaðin, sum hann fekk í dystinum móti Cypros helt honum burtur frá fótbóltinum eina tíð.

Seinastu vikurnar hevur Claus Bech Jørgensen at kalla verið fastur maður á liðnum, sum nú er undir leiðslu av Micky Adams. Hesa tíðina hevur tað eisini eydnast at lyfta se upp um niðurflytingarstrikuna, soleiðis at teir við evstamark hjá hesum blaðnum eru tvey stig omanfyri Gillingham á 22 plássinum.

Tá vóru tó framvegis níggju dystir eftir at spæla, so tað er so langt ífrá sloppið hjá Claus og teimum enn.

Men við nøvnum sum Ian Bennet, Richard Shaw, Marcus Hall, Stephen Hughes, Tim Sherwood, Stern John og sjálvandi Claus Bech Jørgensen, so átti góðskan á liðnum verið ov góð til ein niðurflytingarsess.

# Rógvi skal royna seg

**Saman við nýggju liðfeløgunum skal Rógvi Jacobsen royna at betra um skuffandi sætta plássið frá kappingarárinum í fjør**



*Við føroyskum jarni á miðvøllinum ætlar KR sær nú aftur í toppin av íslendsku landskappingini*

**Útiseti**

*Jákup Mørk*

Kanska mest týðandi leikarin á HB-liðnum, sum í fjør vann gull triðja árið á rað, var Rógvi Jacobsen. Umframt at vísa seg sum vandamesti leikarin á liðnum, átti hann eisini stóran lut í tí partinum av HB-uppspælinum, har bólturin skuldi flytast skjótt niðan til álopspartin.

Fáur føroyskur leikari – um nakar – man standa Rógva kurl, tá tað ræður um at vinna luftdystir, men einki er at ivast í, at hann fær sína søk fyri, nú talan verður um fótbólt í Íslandi.

Her halda tey nevnliga, at Rógvi fer at hóska sera væl inn á liðið. Við sterka luftspælinum, kropsligu styrkini, og ikki minst góðum máltevi er hartarbeiðandi klaksvíkingurin eisini í nógvar mátar ynskismaðurin hjá einum venjara, tá tað ræður um at finna ein góðan miðvallara.

Og tað er eisini neyðugt, skal KR vinna seg longur upp á stigatalvuna. Í fjør endaði liðið á einum skuffandi sætta plássi, sum var nakað langt niðanfyri málið um enn eitt meistaraheiti til felagið.

So er spurningurin, um tað fer at eydanst at røkka hesum, men eftir trý ár við gulli, skuldi tað verið løgið, um Rógvi Jacobsen fer at vera nøgdur við nakað minni enn gull.

Í næstbestu deildini fer annar føroyingur at spæla. Tað er Hans Fróði Hansen, sum eftir eitt ár í Fram nú fer at royna seg hjá Breiðablik.